VÁGA KOMMUNA

# *Reglugerð*

*fyri útlutan av kommunalum grundstykkjum*

Treytir viðvíkjandi sølu av grundøkjum:

Vága kommuna vil tryggja sær, at selt verður til tey, ið veruliga hava tørv á grundøki, og hava ítøkiligar ætlanir um at byggja sethús á tað. Tí raðfestir kommunan soleiðis:

Áhuga rinda Vága kommunu eitt gjald á kr. 10.000,- fyri at seta seg á bíðilista. Gjaldið verður endurrindað um viðkomandi tekur seg av listanum, og annars drigið frá keypsprísinum, tá grundstykkið skal gjaldast.

Annars er tilsøgnin uppá grundstykki treytað av:

1. at viðkomandi, áðrenn tilsøgn verður givin, letur kommununi váttan um fígging/tøkan pening frá peningastovni.
2. at viðkomandi innan 6 mánaðir eftir tilsøgn letur kommununi ítøkiligar ætlanir/tekningar, og umsókn um byggiloyvi.
3. at bygt verður innan fyri tvey ár. Er bygging ikki byrjað á tillutaðum grundstykki tvey ár eftir, hevur kommunan rætt, men ikki skyldu til, at krevja grundstykkið aftur móti at rinda sama prís fyri grundstykkið, sum umsøkjarin rindaði fyri tað.
4. ætlar viðkomandi ikki at byggja tvey tey næstu árini, ber ikki til at seta fram ynski um ítøkiligt stykki.

Tá ið treytirnar undir pkt. 1 og 2 eru ,loknar, verður skeytið útskrivað – treytað av, at keypspeningurin tá verður goldin.

Soleiðis samtykt á býráðsfundi 21.12.2021

Bjarni Prior
*borgarstjóri*

Jóhan Hendrik Ellefsen
*kommunustjóri*

Hammershaimbsvegur 1 // FO 360 Sandavágur
Tel +298 344 400 // vaga@vaga.fo

www.vaga.fo